# ÚTLOND

SAMBAND
Árni Joensen
arni@sosialurin.fo
tlf. 341800

*-Dag Hammerskiöld doyði ikki av flogvanlukku. Hann bleiv myrdur (fyrrv. norskur leiguhermaður).*

## Vil hava nýggja grundlóg í jólagávu

**Á 50 ára degnum vóru flestu ES-leiðararnir samdir um, at samveldið eigur at fáa eitt nýtt støði sum skjótast. Týski kanslarin vil hava semju longu í ár.**




*-Tað verður eitt søguligt mistak, megna vit ikki at loysa spurningin um grundlógina, heldur týski kanslarin.*

Fleiri túsund ballónir vórðu sleptar upp í loft í Berlin í gjár í sambandi við, at 50 ár eru liðin, síðani byrjanin til ES, Romsáttmálin, bleiv undirskrivaður.

Men 50 ára dagurin var ikki bara gaman, og verturin, týski kanslarin Angela Merkel, nýtti høvi til at ávara sínar gestir um, at tað er umráðandi at loysa spurningin um sjálvt grundarlagið undir samstarvinum. Við hesum sipaði hon til uppskotið hjá grundlóg, sum fór fyri bakka, tí fransmenn og niðurlendingar vrakaðu tað á fólkaatkvøðu.

-Tað verður einki minni enn eitt søguligt mistak, fáa vit ikki greiði á viðurskiftunum, og tað eiga vit at fáa frá hondini í hesum árinum, segði týski kanslarin í røðu síni fyri hinum ríkis- og stjórnarleiðarunum. Politiskir eygleiðarar í Berlin ivast kortini í, at tað fer at eydnast at fáa semju longu í ár.

Í einari kunngerð frá fundinum í Berlin stendur, at spurningurin um grundlógina skal loysast innan valið til ES-tingið í 2009. Eygleiðarar í Berlin siga, at skal tað eydnast, noyðast londini longu í ár at semjast um, hvussu arbeiðast skal fyri at fáa øll londini at góðtaka grundlógina.

At tað verður trupult sást longu í gjár, tá polski forsetin, Lech Kaczynski, segði, at Pólland vil hava fleiri broytingar í tí upprunaliga grundlógaruppskotinum. Hann gjørdi millum annað greitt, at Pólland vil hava ávirkan sum eitt av timum stóru limalondunum, og at landið hevur tíð at bíða eftir teirri endaligu loysnini.

### STUTT SAGT

**Sakna tað gamla**

Næstan helmingurin av fólkinum í teimum 13 ES-londunum, sum brúka evruna sum gjaldoyra, vilja heldur hava síni egnu, gomlu gjaldoyru aftur. Ein kanning, sum er gjørd í sambandi við 50 ára dagin hjá samveldinum, vísir, at 49 prosent av fólkinum í hesum londunum vilja heldur hava tey gomlu gjaldoyruni aftur. 47 prosent haldahinvegin, at evran er í lagi. Sama kanning vísir, at ES-borgararnir eru ójavnir á máli um, hvussu nógv vald sjálvt samveldið skal hava. 41 siga, at tey taka undir við at miðsavna valdið meiri, og onnur 41 prosent siga nei. Tey seinastu 18 vita ikki.

**Rætt at samráðast**

Næstan helmingurin av spanska fólkinum halda, at stjórnin í Madrid eigur at samráðast við baskiska loysingarfelagsskapin ETA fyri at viota, um varandi friður kann fásst í lag. Fyri einum ári síðani kunngjørdi ETA, at felagsskapurin var sinnaður at binda frið, um stjórnin vildi samráðast. Men friðartilgongdin fór fyri bakka stutt fyri nýggjár, tá ETA sprongdi eina bumbu í floghavnini í Madrid, og tvey fólk lótu lív. Tilburðurin fekk stjórnina at sleppa friðarroyndunum, men nú siga 48 prosent av fólkinum, at royndin skal takast uppaftur. 39 prosent eru ímóti.

**Sidney sparir streym**

Gongst sum ætlað verður leygardagurin tann 31. mars í 2007 rættiliga sjáldsamur eina løtu í avstralska stórbýnum Sidney. Fyri at vísa sín góða vilja til at hjálpa umhvørvinum hevur býurin gjørt av at sløkkja øll ljós í eina tíma leygarmorgunin frá klokkan hálvgum átta. Tað merkir millum annað, at tað kenda operahúsið verður myrkalagt, og tað sama er galdnandi fyri ta kendu brúnna Harbour Bridge, øll háhúsini í býnum og øll vanlig sethús og íbúðir. Tiltakið er byrjanin til eitt átak, sum skal fáa fólk í Avstralia at spara streym fyri at verja umhvørvið og at tálma veðurlagsbroytingunum.



*Brigitte Mohnhaupt varð hildin at vera heilin aftan fyri yvirgangin í Týsklandi í sjeytiárunum.*

## Leys eftir 24 ár í fongsli

**Brigitte Mohnhaupt varð hildin at vera heilin aftan fyri yvirgangin hjá Roote Armé Fraktion. Í gjár slapp hon úr fongslinum.**

Upprunaliga skuldi hon latast leys í morgin, men leiðslan í fongslinum valdi at lata hana sleppa út í gjár fyri at sleppa undan tíðindafólkum og møguligum mótmælisfólkum. Tí tað eru minni enn so øll, sum eru so fegin um, at Brigitte Mohnhaupt sleppur leys, sjálvt um hon hevur sitið sín dóm.

Hon var ein av leiðarunum í týska yvirgangsfelagsskapinum Roote Armé Fraktion, sum herjaði Týskland í sjeytiárunum. Millum teirra, sum lótu lív fyri teirra hond, vóru arbeiðsgevaraformaðurin Hans-Martin Schleyer, ríkisadvokaturin Siegfried Buback og bankastjórin Jürgen Ponto.

Í 1982 varð Brigitte Mohnhaupt tikin, og í rættinum varð hon dømd fyri at hava framt ella medvirkað til níggju morð. Hon fekk lívlanga fongsulsrevsing, og rætturin gjørdi samstundis av, at hon kundi ikki sleppa úr fongslinum fyrr enn í fyrsta lagi um 24 ár. Tað er í morgin.

Týska løgreglan sigur, at Brigitte Mohnhaupt er ikki nøkur hóttan fyri samfelagið longur, og sambært einum tíðarriti hevur hon longu fingið arbeiði á einum virki, sum ger lutir til bilar.